# Quiz

**1** *Hvussu eitur forstjórin í Eik Banka, sum fór úr starvinum mánadagin?*

**2** Eitt fótbóltsfelag tryggjaði sær mikukvøldið pláss í Vodafone deildini komandi kappingarár. *Hvat felag var tað?*

**3** SMS hevur fingði nýggjan marknaðar-leiðara. *Hvussu eitur hann?*

**4** Føroyska sendikvinnan í Reykjavík hevur takkað fyri seg. *Hvussu eitur hon?*

**5** Danski vinnumálaráðharrin segði í vikuni, at kundarnir í Eik Banka skulu kenna seg tryggar. *Hvussu eitur vinnumálaráðharrin í Danmark*

**6** Gordon Gekko ger comeback í nýggjum Wall Street filmi. *Hvør hevur leiklutin sum Gekko?*

**7** Sosialurin skrivar, at italskt oljufelag helst hevur rakt við gass í føroysku undigrundini. *Hvussu eitur oljufelagið?*

**8** *Hvussu eitur borgarstjórin í Sunda kommunu?*

**9** *Í hvørjari kommunu er Kirstin Strøm Bech borgarstjóri?*

**10** *Umframt løgmann, hvussu nógv lands-stýrisfólk eru í ABC-samgonguni?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veitst tú alt?

**SVAR**
*1. Marner Jacobsen, 2. 07 Vestur, 3. Bogi Andreasen, 4. Gunvør Balle, 5. Brian Mikkelsen, 6. Michael Douglas, 7. ENI, 8. Kim Durhuus, 9. Vágs kommunu, 10. Átta landsstýrisfólk*

**10 TING UM** Venceslaus Ulricus Hammershaimb

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale



# Eygleiddi føroyingar

HANN VAR AVMYNDAÐUR Á GULU **HUNDRAÐKRÓNUSEÐLUNUM** OG VAR **FAÐIRIN** AT FØROYSKA **SKRIFTMÁLINUM**. HANN VARÐ EISINI SENDUR AV LANDINUM SUM **12 ÁRA GAMAL**, OG SEINNI **GIFTIST** HANN EINI KVINNU, SUM VAR 10 ÁR YNGRI.

**1** Venzel Hammershaimb, sum hann vanliga verður nevndur, varð føddur 25. mars 1819 á Steig í Sandavági,har hann búði fyrstu árini. Pápin var løgmaður Jørgen Frants Hammershaimb og mamman var Armgarð Maria, fødd Egholm.

**2** Hammershaimb vaks upp í Nýggjustovu í Havn, men tá hann var 12 ára gamal, varð hann send-ur til Keypmannahavnar at ganga í skúla og verða dannaður.

**3** Tá hann var 20 ára gamal varð hann innskrivaður á universitetið, har hann læs teologi.

**4** Í 1847, tá hann var 26 ár, var hann liðugur at lesa til prest í Keypmannahavn. Sama ár fór hann til Føroya at savna vísur, sagnir og annað og at granska ymsu dialektirnar í Føroyum. Ferðin vardi eitt ár.

**5** Tá hann kom aftur til Danmarkar, fór hann smátt um smátt undir at geva tilfarið út, sum hann hevði savnað sær saman.

**6** Tá hann var 36 ára gamal, giftist hann Elisabeth Christiane Gad úr Havn, sum var próvstadóttir og 10 ár yngri enn hann.

**7** Hann var vinur við Grundtvig og hevði støðugt brævasamskifti við bæði hann og sonin, Svend Grundtvig, sum hann eisini arbeiddi nógv saman við.

**8** Hammershaimb var óvanliga málkunnugur, og hann legði lunnar undir føroyska skriftmálið. Hann gjørdi eitt stórt arbeiði við at kortleggja føroysku grammatikkina. Føroyskt varð bygt á gamla norrøna málið, sum hann dugdi væl, íslendskt og danskt.

**9** Kendastu útgivnu verkini eru *Føroyingasøga*, *Færøiske Kvæder* og *Færøisk Anthologi*, sum serliga lýsa føroyska skaldskapin og annars gerandislívið í Føroyum.

**10** Hammershaimb doyði 8. apríl 1909 og er jarðaður í Lyderslev, nakað sunnan fyri Keypmannahavn.

**SITAT**



Ein kvinna, sum vil svørja uppá, at hon aldri er vorðin kyst, hevur sanniliga eisini orsøk at svørja!r

***Brigitte Bardot***